## Gongur rættan veg

Tað gongur tann rætta vegin hjá rækjutrolarunum. Prísurin á rækjum er hækkandi, samstundis sum oljuprísurin hevur verið lækkandi. Fiskaríið er eisini í lagi. Arctic Wiking er júst farin nýggjan túr á leiðirnar við Svalbard. Teir komu á fiskileið fyri nøkrum døgum síðani, og teir hava ligið um tíggju tons av rækjum um dagin hesar dagarnar. Støddin á rækjunum er heilt góð, og tí er fiskiskapurin lønandi, sigur reiðaríið.

## Vinnufundur

Mikukvøldið 6. desember fáa norðoyingar og onnur áhugað eitt boð uppá, hvønn veg tann føroyski búskapurin fer at menna seg. Mentanardeildin hjá Klaksvíkar kommunu hevur boðið formanninum í Búskaparráðnum, Jørn Astrup Hansen, til Klaksvíkar at halda fyrilestur um spurningin. Eitt nú verður spurt, um gongdin við veksandi privatari skuld og øktum halli á handilsjavnanum er náttúrlig. Fundurin verður í Tekniska Skúla klokkan 19.

# Gøta og Leirvík fyrireika seg til samanlegging



*Íløgutørvurin hevur sett sín dám á fíggjarætlanina hjá Gøtu kommunu fyri 2007, sum javnvigar við sløkum 42 mió krónum*

**Gøtu kommuna og Leirvíkar k ommuna eru samdar um, at tørvur er á at gera stórar íløgur í báðum kommununum fram til samanleggingina. – Men semja er eisini um, at nettoskuldin hjá báðum kommununum skal verða minni enn 3/4 av eini álíkning, tá ið lagt verður saman 1. januar 2009**

Kommunur
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Gøtu kommuna og Leirvíkar kommuna verða ein kommuna um tvey ár. Tá verða øll fíggjarviðurskifti í samanløgdu kommununi, sum fer at eita Eystur Kommuna, eins fyri allar borgararnar.

- Men longu nú leggja kommunurnar seg eftir at samskipa íløgur, íløgukarm og ymisk gjøld soleiðis, at tær gerast líkari hvørji aðrari fram til samanleggingina.

Tað sigur Gøtu kommuna, nú fíggjarætlanin fyri komandi ár er komin undir land.

Lagt verður aftrat, at Gøtu kommuna og Leirvíkar kommuna eru á einum máli um, at tørvur er á at gera stórar íløgur í báðum kommununum fram til samanleggingina.

- Men semja er eisini um, at nettoskuldin hjá báðum kommununum skal verða minni enn 3/4 av eini álíkning, tá ið lagt verður saman 1. januar 2009.

**Íløgutørvurin**
Gøtu kommuna sigur, at íløgutørvurin hevur sett sín dám á fíggjarætlanina fyri 2007, sum javnvigar við sløkum 42 mió krónum.

- Av hesi upphædd fara um 23 mió krónur til rakstur, slakar 3 til rentur og avdráttir, og 16 mió krónur fara til íløgur. Inntøkurnar eru varisliga mettar til 29 mió krónur í 2007.

Skattaprosentið í Gøtu kommunu er óbroytt, 20,5%, og barnafrádrátturin er framhaldandi 5.000 krónur fyri hvørt barnið.

Av størri verkætlanum, sum liggja fyri framman, er nýggjur útstykkingarvegur fram við handils-og vinnuøkinum í Gøtudali fyri 4,5 mió krónur. Hesin vegur skal verða til reiðar at binda í rundkoyring, sum Landsverk ætlar at gera í Gøtudali komandi ár.

**Felags hús**
Ætlanin er eisini at nýta 4 mió krónur til fyrsta byggistig av felagshúsi við áskoðaraskýli við fótbóltsvøllin í Sarpugerði.

- Ásannast má, at hølisviðurskiftini kring vøllin als ikki eru nøktandi, og um vit skulu lúka tey krøv, ið FSF og FIFA seta fyri framhaldandi luttøku í bestu føroysku fótbóltsdeildini, er hendan íløga neyðug, sigur kommunan.

Frítíðarskúlin í Gøtu hevur húsast í ymiskum leigaðum hølum, men nú er so ætlanin at keypa og seta í stand væl egnaði høli, sum spælistovan hjá dagrøktini eisini kann fáa gagn av. Hendan íløgan kemur at kosta kommununi 2,4 mió krónur.

- Eins og Leirvíkar kommuna, fer Gøtu kommuna eisini undir at gera nýggja bygda- og býarskipan, har ætlanir verða lagdar fyri, hvussu vit skipa okkara kommunu og komandi Eystur Kommunu í framtíðini. Hendan verkætlanin fer at kosta okkum umleið 1 mió krónur í komandi ári.

Avøðrumíløgum, sum liggja fyri framman hjá Gøtu kommunu í 2007, er íløgur í útstykking, asfaltering, kloakkviðurskifti, skúla, eldraøkið og havnalagið.

**Gøtu søga**
Gøtu kommuna ætlar eisini, at nú skal Gøtu søga skrivast, og bygdaráðið ásannar, at hetta verður ein spennandi verkætlan.

- Bygdirnar í kommununi hava frá fornari tíð ikki

# Vænta hitabylgju um allan heimin

**Áhugavert verður at síggja, hvat ein hitabylgja fer at merkja fyri eitt nú fiskaprísir og oljuprísir, um spádómurin hjá veðurlagsgranskarum fer at halda**

HITALAG
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Viðurkendi granskingarstovnurin IRI (The International Research Institute for Climate and Society) ávarar nú um, at tað verður heitari enn vanligt um alla jørðina komandi tríggjar mánaðirnar.

Stovnurin vísir á eina globala hitabylgju, og tosað verður aftur um veðurlagsfyribrigdi El Niño.

Sum skilst á útlendskum fjølmiðlum, gevur ávaringin hjá IRI afturljóð millum veðurlagsgranskarar kring um heimin.

**Petur ivast**
Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, sigur seg ivast í, hvat veðurlagsgranskarar soleiðis kunnu siga við vissu um hitalagið tríggjar mánaðir fram.

- Tað gongur ímóti vetri, og í øllum førum er í løtuni líkt til, at vit her um okkara leiðir fáa kaldari veður í nakrar dagar, sigur veðurfrøðingurin.

At jørðin hinvegin gerst heitari, og at umhvørvisdálking ávirkar bæði hita og veðurlag á jørðini annars, er okkara veðurfrøðingur als ikki ósamdur í.

Áhugavert verður at síggja, hvat ein slík hitabylgja fer at merkja fyri eitt nú fiskaprísir og oljuprísir, um spádómurin hjá veðurlagsgranskarum fer at halda.



*Alt er relativt, verður sagt. Hóast veðurlagsgranskarar spáa hitabylgju um allan heimin komandi tríggjar mánaðirnar, er ivasamt, um vit í Føroyum kunnu vænta okkum summarveður á hávetri*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*